# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV@
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

*Trupult verður tí hjá Injector at gera endurgjaldskrav ímóti Rock í Vági*

*Hans J. Joensen*

## ST má leggja uppí

Stríðið millum Ísrael og Hizbollah stendur við og versnar. Einki røkist fyri nakrari loysn. Seinasta hendingin, har ísraelskar rakettir hava rakt eina ST-støð og dripið fýra fólk, hevur fingið sjálvan ST-aðalskrivaran at skuldseta Ísrael fyri við vilja at hava gjørt seg inn á ST-deildina. Ovasti leiðarin í Saudi Arabia hevur eisini tikið blaðið frá munninum og sigur, at tað verður stórkríggj í øllum Miðeystri, um Ísrael ikki gevst við at bumba Libanon.

Her er eftir øllum at døma bert eitt at gera. Tað er, at Trygdarráðið hjá ST leggur upp í og samtykkir at senda ST herdeildir til Suðurlibanon. Uttan at spyrja teir stríðandi partarnar. ST hevur heimild til sjálvboðið at senda friðardeildir til Suðurlibanon og skilja sundur partarnar. Og harvið sleppa sivila fólkinum báðumegin markið undan at skula liva í ótta fyri lívinum.

Trygdarráðið hjá ST, sum fevnir um USA, Rusland, Kina, Frakland og Bretland, eigur tí alt fyri eitt at taka neyðuga stigið. Hetta er einasti mátin at steðga ørskapinum. Og verður hetta ikki gjørt heilt skjótt kann henda, at eingin fer at hava tamarhald á útviklinginum.

Tað er sera hugstoytt, at USA, sum ynskir at gjøgnumføra demokrati kring heimin, ikki letst um vón, men heldur dregur støðuna út. Tað sær ikki mætari út enn, at tað hóvar Bush og hansara heykum væl, at Ísrael heldur fram við at berja niður Hizbollah eins og Hamas. Hetta passar sum fótur í hosu í amerikonsku útleggingina av altjóða terrorismuni. Aftur og aftur hoyra vit Bush tosa um bardagan móti terrorismuni, tó at vit vita, at bæði Hamas og Hizbollah hava stóra undirtøku í fólkinum, har Hamas vann eitt demokratiskt val og har Hizbollah er umboðað í fólkavalda tinginum í Libanon.

Tíverri tykist tað sum at serstakliga valdselitan í USA brúkar altjóða vígvøllin til at sæta sær og sínum. Tað passar í terrrorpolitikkin hjá Bush at halda lív í ísraelsku álopunum á sínar grannar, nú tað skjótt verður val aftur í USA til bæði Kongressina og Umboðsmannatingið.

Heldur USA fram við einvíst at halda hondina yvir Ísrael, kann hetta fáa katastrofalar fylgjur fyri ikki bert Miðeystur men eisini fyri allan Vesturheimin. Fara oljuprísirnir at hækka enn meira, orsakað av krígnum, fer tað at raka allan Vesturheimin. Vónandi fær ST lagt uppí, áðrenn Hizbollah kennir seg so nógv hótt, at tað við møguligum stuðuli frá bæði Sýrialandi og Iran sendir rakettir móti Tel Aviv. Tá kenna vit øll reaktiónina frá ísraelskari síðu, og tað verður endaligi neistin til eitt ragnarrok í øllum Miðeystri. Trygdarráðið hjá ST og her serstakliga USA eigur lykilin til eina loysn á verandi stríði og bara tey kunnu forða einum blaðbað.

**Sosialurin**

# Sea Bat og Stealth eru heilt ymiskir

HANS J. JOENSEN

**Eftir eitt ógrundað og ljótt álop á meg persónliga og felagið sum eg havi leiðsluna av, í Sosialinum mánakvøldið, verði eg noyddur at geva fólki eina sakliga viðmerking av tí, sum harra Jan Allan Müller leggur okkum undir**

**Eg fari tó fyrst at heita á journalistin frá Sosialinum um at kontakta Helga Larsen persónliga og spyrja hann um hann hevur teknað SEA-BAT modellið?**

**Eg haldi eisini, at tað er djarvt, at fara út at krevja endurgjald frá einum, sum man farmmanundan skyldar langt yvir eina millión til.**

**Flótitrolslemmarnir Sea Bat, hjá Rock í Vági, og Stealth hjá Injector ApS. eru heilt ymiskir.**

Leygardagin visti Sosialurin at siga frá, at nýggju flótitrolslemmarnir, sum eru mentir og framleiddir á lemmavirkinum Rock í Vági, eru óvanliga góðir, og hartil spara í túsundavís av krónum í oljunýtslu um dagin. Hetta greiddi Sonni Johannsen, skipari á Ennibergi, frá í samrøðu við Sosialin. Suðurrás hevði eisini 1. mai í ár grein um flótitrolslemmunurnir Sea Bat, og var tá eisini samrøða við Sonna Johannesen í sendingini Viðurgerði, sum varð send sama dag. Umframt at samrøða eisini var við undirritaða, stjóra á Rock, sum saman við Johannes Andreassen á Rock, hevur ment flótitrolslemmarnir Sea Bat. Lemmavirkið Rock hevur gjørt hesar lemmar til m.a. Enniberg og Finnur Fríða.

**Sosialurin blandar tveir ymiskir flótitrolslemmar saman.**

Í Sosialinum í gjár (mánakvøld) vil Jan Allan Müller, stjóri á Injector, verða við, at nýggju flótitrolslemmarnir hjá Rock eru eftirgjørdur eftir flótitrolslemmunum Stealth, sum Helgi Larsen hevur ment. Men við at samanbera tekningar av lemmunum báðum og hartil myndir sæst, at talan er um hvør sítt design.

**Tveir ymiskir flótitrolslemmar.**

Niðanfyri eru tekningar av flótitrolslemmunum Sea Bat (Rock) og Stealth (Injector). Hesar tekningar vísa greitt, at lemmarnir báðir eru heilt ymiskir (pílurin vísur frammeftir á lemminum).

Sea Bat (vinstrumegin) er samansett av 9 plátum, meðan Stealth (høgrumegin) hevur 12 plátur. Ongin pláta er eins á lemmunum báðum.

Báðir lemmarnir eru "knekkaðir". Tað eru flestu flótitrolslemmar í dag. Hetta er bæði galdandi fyri flótitrolslemmar hjá Rock, Injector ApS, Thyborøn Skibssmedie í Danmark, Hampidjan í Íslandi, og Egersund Trål AS í Norra.

Eisini myndir av lemmunum vísa greitt munin – og her krevst sum so ikki, at ein er serfrøðingur fyri at síggja sjónliga munin á lemmunum báðum.

Tekningar og myndir vísa greitt, at talan er um tveir heilt ymiskar flótitrolslemmar. Trupult verður tí hjá Injector at gera endurgjaldskrav ímóti Rock í Vági, tá talan er um tveir ymiskar lemmar og tvey ymisk design.

Í Sosialinum setur Jan Allan Muller spurnartekin við førleikan hjá monnunum á SP/F Rock, til at tekna og gera eitt sett av flótitrollemmum. Stjórin í SP/F Rock hevur góða útbúgving og hevur fiskað við og fingist við lemmar í 35 ár, so hann veit allarhelst hvat er hvat.

Um Helgi Larsen ,saman við Jan Allan Müller kann koma á markedið við enn betri lemmum enn SEA-BAT , sum eru teknaðir og gjørdir í Vági , so vilja vit frá SP/F Rock og undirritaða bara ynskja teimum góða eydnu við tí.







**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Lív Højsted Horsdal horsdal@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Heini Kristiansen heinik@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støddir:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.